## Chelsea hevur dýrasta hópin

Ikki óvæntað er Chelsea ovasta liðið, nú týska Transfermarket hevur mett um, hvussu nógv hópirnir hjá ymsu feløgunum í Evropa kosta. Hópurin hjá Chelsea er verdur nærum 3 mia kr., og tað eru meira enn hálva milliard meira enn næstovasta liðið felagið á listanum, sum er Barcelona. Listin sær annars soleiðis út. 1 Chelsea (2,96 mia kr.), 2. Barcelona (2,39), 3. Real Madrid (2,23), 4. Inter (1,69), 5 Manchester United (1,58), 6. Milan (1,45), 7. Arsenal (1,44), 8. Juventus (1,37), 9. Liverpool (1,35), 10. Atletico Madrid (1,24).

**-mørk**

## Toni vil ikki til Inter




Fiorentina áleyparin, Luca Toni, hevur alment boðað frá, at hann ynskir at sleppa til eitt størri felag. Men nú slær hann fast, at hetta so í øllum førum ikki verður Inter. Inter hevur annars verið sett í samband við Toni, men sjálvur sigur áleyparin nú, at hann vil halda fram í Fiorentina. – Eg havi tosað við leiðsluna, og vit eru samd um, at nú skal eg bara hugsa um at fáa best møgulig úrslit í Fiorentina, sigur Toni.

**-mørk**

B36-GÍ 1-1 (1-0):

# Gøtumenn tóku stikkið

*B36*

*GÍ*

**Dómarin kundi tað sama spælt sjavs í Gundadali, har gøtumenn tóku seinasta stikkið. Bæði í kortsavnanini, har teir fingu 5 fúsir og tveir stikkarar. Og í stigum, har teir helst vóru fegnari enn vertirnir í stigabýtinum. Eisini hóast teir við góðari hond spældu kortini skeivt**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Talan var um óvanliga nógv kort, tá GÍ vitjaði hjá B36 í Gundadali týskvøldið*

*savnsmynd*

Meira enn nakað annað, so fer dysturin í Gundadali týskvøldið at verða mintur fyri ófantaliga og til tíðir beinleiðis vandamikla spælið, sum gekk fyri seg á vøllinum. Á dómarablokkinum gav hetta 11 gul – harav tvey vórðu konverterað til reyð – og eitt beinleiðis reytt kort. Og hetta var nokk heldur ikki eitt tað einasta ov nógv. Um nakað, so kundi Eiler Rasmussen kanska havt lenað seg heilt upp at Valentin Ivanov. Russiska dómaranum, sum í HM 1/8-finaluni millum Portugal og Holland heðvi kortini úr lummanum 18 ferðir – harav reytt fýra ferðir.

### Vøkur mál

Á úrslitatalvuni stendur tó lítið um mongu kortini, sum fullu í dystinum. Hon staðfestir, at tey bæði liðini við javnleikinum týskvøldið at kalla spældu seg sjálvan út í kapprenningini eftir EB/Streymi. Og hóast báðir partar munnu iðra seg um tann veruleikan, so kundu gøtumenn uttan iva vera best nøgdir um javnleikin.

Tí tað tóktist fyrst og fremst vera hesum, sum GÍ var komið eftir. Talt eftir møguleikum, so skoraði GÍ upp á helst einasta veruliga av slagnum, tá Gunnar effektivt endaði sera vakurt kontra, eftir at GÍ hevði fangað B36 bólttap í uppspælinum.

Júst tann uppskriftin var fyri tað nógva tann, sum GÍ hevði lagt seg eftir, og longu tíðliga í dystinum stóð greitt, at tað var B36, sum skuldi verða spælstýrandi parturin í dystinum.

Tað gav eisini einstakar møguleikar til vertirnar, men bestu royndina átti tó Ásbjørn Gunnarson, tá hann úr 18 metrum sendi dundurskot á stólpan.

Á hálva tímanum glapp tó hjá B36. Fróði Benjaminsen spældi við bringuni til Sylla, sum dró, bíðaði og slepti í júst røttu løtu, soleiðis at Bergur Midjord fekk sent bóltin í kassan.

### Kortspælið

Málið tóktist geva B36 neyðuga friðin yvir spælið. Gøtumenn tóktust á ongan hátt vilja leypa framav, og tá B36 ikki hevði tann stóra tørvin á seta ferðina alt ov langt upp, gekk tað nógva nú fyri seg í gongutempo.

Tað kundi tað kanska gjørt seinastu 55 minuttirnar, um sinniliga javnvágin hjá spælarunum var í lagi, men tað var hon so langt ífrá.

Gøtumenn høvdu hug at spæla hart, og tað sluppu teir ikki at gera einsamallir. Herbert í Lon Jacobsen hevði longu lenað seg upp at seinna gula kortinum, tá hann stutt fyri hálvleik fekk hetta, eftir at hann hevði framt fríspark uppi á miðvøllinum.

GÍ hevði tí fyrimunin frá byrjan í seinna hálvleiki, og við útjavningini høvdu teir av álvara møguleikan at seta seg á dystin. Tí líktist tað eini fullkomnari heilabløðing, tá Hans Jørgen Djurhuus púrasta fyriliturleyst í knæhædd kastaði seg inn í Berg Midjord, og reyða kortið frá dómarunum fekk eingin sett spurnartekin við. Og tað fingu tey fægstu, tá Sverri Jacobsen fáar minuttir seinni fekk sítt seinna gula kort. Hetta eftir at hann fleiri ferðir við báðum fótum fremst hevði roynt at stressa mótstøðuverjuna.

### Trýstið bjargaði ikki vónini

Útvísingarnar gjørdu sjálvsagt, at B36 nú aftur fekk sett seg á dystin. Við at flyta bæði Alex og Fróða langt niðan á vøllin, megnaðu teir eisini at skapa eitt massivt trýst fyrstu 10 minuttirnar eftir seinna reyða GÍ-kortið. Hóast góðar royndir og møguleikar, so eydnaðist tó ikki at fáa neyðuga málið, og tá GÍ so líðandi megnaði at toga ferðina úr dystinum, gjørdist B36 sjáldan heilt so vandamikið aftur. Tí kundi illa mótmælast móti útskiftingunum, tá Sigfríður Clementsen at enda sendi frískar menn inn fyri Sylla og Obi. Og hóast serliga Sylla sýndi sína ónøgd um hetta við at renna beina leið í skiftingarrúmið, so var tó um reppið, at útskiftingin gav bonus. Í øllum førum mundi Sigurd Carlson iðra seg, tá hann í yvirtíðini hevði avgjørt størsta møguleikan at senda øll stigini til Havnar, men júst innkomin var hann ikki nóg kaldur, tá møguleikin beyðst.

Hevði B36 fingið øll stigini, so hevði FM-vónin ivaleyst verið størri, enn hon er tað í dag. Tað vildi hon væl eisini verið hjá GÍ, um teir tóku stigini, men á hvør sín hátt tveittu liðini sín møguleika burtur týsdagin. B36 við ikki at skora upp á sínar møguleikar, og GÍ við bókstaviliga at spæla kortini skeivt, tá teir høvdu trumfirnar í hondini.

## Gloymdur á dómaraseðlinum

Jóhan Dávur Højgaard, sum annars er av Toftum og hevur spælt fyri B68, fekk sínar fyrstu minuttir á besta GÍ-liðnum, tá hann kom á vøllin seinastu løtuna í Gundadali. Men tað var nú ongan tíð ætlanin, at hann skuldi sendast á vøllin.

Tá GÍ markeraði sína triðu útskifting, var tað nevnliga Poul Andrias Jacobsen, sum hevði hitað upp í góða løtu. Hann stoðo eisini klárur at koma inn fyri Hanus Jacobsen, men tá hjálpardómarin skuldi skráseta útskiftingina, kom hann eftir, at eingin Poul Andrias stóð á dómaraseðlinum.

– Tað var ikki eg, sum skrivaði dómaraseðilin, og tað var nær við, at sinni feyk avstað við mær, tá eg varnaðist mistakið. Men eg kláraði so at halda mær nøkunlunda, segði GÍ-venjarin, Petur Mohr, eftir dystin.

Tá kundi hann hóast alt flenna at hendingini, og sjálvur helt hann, at tað kanska kundi verið eitt hugskot, um hann sjálvur átók sær hesa uppgávuna komandi dystirnar.

Um dystin sjálvan helt Petur, at sum hesin lagaði seg, so var tað ein lætti at sleppa avstað við einum stigi.

– Tað blívur næstan, sum tá altjóða luttøku er á skránni. Eftir tær báðar útvísingarnar verða vit fyri tað nógva trýstir langt aftur, og so ræður um at standa rætt og vera væl skipaðir. Tað megnaðu vit tíbetur, og burtur sæð frá eini lítlari løtu eftir seinna reyða kortið, megnar B36 sjáldan at trýsta okkum heilt niður, helt Petur.

**-mørk**

## FM fer til Eiðis

Tað var ein alt annað enn nøgdur Sigfríður Clementsen, sum eftir dystin varð biðin um at gera viðmerkingar til tað, sum hann hevði sæð seinastu góðu 90 minuttirnar.

– Tað er forferdiligt, at vit enn einaferð síggja ein dyst, har dómarin ikki loyvir okkum at spæla fótbólt. Gaman í gevur hann nøkur kort, men tey kundu væl verið nógv fleiri í tali. Og gaman í leggur hann fimm minuttir afturat, men teir kundu væl verið dupult so nógvir. Eg skal ikki siga gøtumenn ringar fyri teirra spæl, tí teir fara akkurát hartil, sum teir sleppa, og tað er uppgávan hjá dómaranum at seta tað markið, segði B36-venjarin.

Tá tað var sagt, so staðfesti hann tó eisini, at hansara lið kundi avgjørt alt til egnan fyrimun.

– Vit skora ikki upp á okkara møguleikar, og teir skora so upp á tann einasta, sum teir hava, so í so máta kunnu vit bara takka okkum sjálvum.

Og var hetta seinasti FM-møguleikin, sum reyk í dag?

– Tað haldi eg róliga, at vit kunnu staðfesta. Í mínum hugaheimi er eingin ivi um, at EB/Streymur tekur FM. Og tað er fult uppiborið. Teir hava vunnið flest dystir. Teir hava skotið flestu málini. Hava fægst gul kort og so framvegis. Men tað er irriterandi, at FSF við síni dystarskrá leggur eitt óneyðugt trýst á okkum. Tá teir hava spælt áðrenn vit – og hava vunnið – so leggur tað eitt trýst á okkum, sum vit gjarna vildu verið fyriuttan. Og tað sæst eisini aftur í fleiri avgerandi støðum í dag, at mínir menn ikki eru nóg kaldir, helt Sigfríður.